# Jenis av Rana grøðir fíggjarlógina 2010

JÓN JOENSEN



Í Sosialinum mikudag 17.11 er ein grein um lækna, floksformann og umboð fyri Miðflokkin á Føroya Løgtingi, Jenis av Rana, har hann sigur seg at hava prógvað, at Gud er til.

Lata vit Guð fáa frið hesaferð, kunnu vit viðgerða restina av greinini og hennara implikatiónir.

Viðvíkjandi evninum er hann citeraður fyri at siga, at »Eg hugsi ofta um, hvussu nógv tað kundi spart samfelagnum, um vit púra sluppu undan heilivági. Hugsa tær, hvussu nógv vit kundu spart á fíggjarlógini.«

Frá hesum citati og restini av greinini er púra greitt, at Jenis av Rana heldur, at øll sjúka kann lekjast við bøn og at øll líðing kann avhjálpast við at heita á Gud, um at gera tað fyri okkum.

Jenis av Rana er alment settur lækni við ábyrgd fyri heilsuni hjá sínum patientum. Hesa ábyrgd skal hann røkja eftir besta yvirbevísningi og eg ivist onga løtu í, at hann ger júst tað. Trupulleikin uppstendur, tá hansara yvirbevísningur ikki samsvarar við veruleikan, sum vit kenna hann.

Jenis av Rana VEIT, at Gud kann grøða hansara sjúklingar, bara hann sleppur at biða fyri teimum. Er hetta hansara uppfatan av læknagerninginum, og hevur hetta ávirkan á hansara virki sum lækni, eigur tað at fáa alarmklokkurnar at ringja, bæði hjá hansara patientum og ikki minst avvarðandi eftirliti. Vandi kann vera fyri, at hann fylgir síni bestu sannføring og ordinerar bøn í staðin fyri heilivág, og kann gera óbótaligan skaða á tey, hann hevur ábyrgd av.

Út frá pástandinum hjá Jenisi, um at Gud er til og aktivt grøðir sjúk, um vit bara biða fyri teimum, kunnu vit seta fylgjandi spurningar:

Útskrivar Jenis minni heilivág enn aðrir læknar?

Eru tey, sum hava Jenis sum kommunulækna, betri fyri enn onnur?

Fáa patientar hjá Jenisi av Rana eina ørðvísi viðgerð, enn aðrir sjúklingar í Føroyum?

Eg meti ikki, at tað er ikki í lagi, at Jenis av Rana blandar læknagerningin og religiøsa upplýsing saman. Og slett ikki tá talan ofta er um menniskju, sum eru í dýrastu neyð og tí góðtaka alt teirra lækni sigur. Tá læknin so stendur við avgerðini millum lív og deyða hjá patientinum og spyr um teir skulu biða saman, eru tað nokk ikki nógvir patientar, sum hava yvirskot at nokta.

Jenis av Rana er settur av tí almenna at vera lækni og ikki religiøsur vegleiðari, eins og fólk vanliga fara til lækna at fáa læknaliga hjálp og í kirkju ella samkomu at fáa andaliga hjálp.

Hevur Jenis rætt í sínum pástandi, haldi eg at tað almenna skal taka avleiðingarnar beinanvegin, seta eitt lið av trúgvandi at biða fyri teimum sjúku og niðurlegga allar sjúkuviðgerðandi partar av heilsuverkinum.

Trupulleikin hjá Løgmanni at fáa fíggjarlógina 2010 at ganga upp, er tá loystur.

## Rætting og umbering

Í blaðnum í gjár prentaðu vit grein hjá Jón Joensen úr Lamba um Jenis av Rana og fíggjarlógina. Tíverri hava vit sett mynd av skeiva manninum – myndin var av Jón Joensen í Bø.
Vit biða báðar umbera okkum mistakið!

**Blaðstj.**



Jenis av Rana grøðir fíggjarlógina 2010

JÓN JOENSEN

Í Sosialinum mikudag

heldur, at øll sjúka kann lekjast við bøn og at øll líðing kann avhjálpast við at heita á Gud, um at gera tað fyri okkum.

Jenis av Rana er alment settur lækni við ábyrgd fyri

fylgir síni bestu sannføring og ordinerar bøn í staðin fyri heilivág, og kann gera óbótaligan skaða á tey, hann hevur ábyrgd av.

Út frá pástandinum hjá Jenisi, um at Gud er til og

---

## … Latið málnevndina sleppa til arbeiðis

*Framhald av síðu 17*

hava egið mál. Politikararnir tosa *á* føroyskum, men ógvuliga sjáldan *um* føroyskt. Í visjón 2015 verður nógv sagt *á* føroyskum, men lítið *um* føroyskt. Tað at vit yvirhøvur kunnu siga nakað *á* føroyskum er treytað av, at vit eisini siga nakað *um* føroyskt. So einfalt er tað, og her vænta visjónir í ólukkumát. So kæru politikarar, eg fari at minna tykkum á, at tað at hava sítt egna mál ikki er nøkur sjálvfylgja, og skulu vit hava eitt livandi og funktionelt mál, krevst, at tað eru fólk, sum arbeiða við tí professionelt.

### Gevast ikki

Politikararnir ríða sjáldan sama dag, sum teir saðla. Í desember 2007 kom eitt álit út um almennan føroyskan málpolitikk; álitið kallast Málmørk. Nú tvey ár eftir, hevur hetta álitið ikki fingið politiska viðgerð í tinginum. Men tað ljóðar, at tað verður lagt fram fyrsta dagin. Sagt verður á fyrstu síðu í hesum áliti, at endamálið við tí yvirskipaða málpolitikkinum er at tryggja og menna støðið undir føroyskum máli og at tryggja føroyskum máli støðu sum fullkomnum og samfelagsbærum máli á øllum økjum í samfelagnum. Og støðið undir hesum arbeiði verður lagt við eini styrktari og útbygdari málstovu og við málnevnd, sum skal virka sambært dagførdari løgtingslóg.

Eg sigi ikki, at málnevndin bara skal arbeiða við yvirskipaðum spurningum, men tann spurningurin verður alt meira átrokandi, tá vit hugsa um altjóðagerðina og tað seinmodernaða samfelagið. Mál er partur av virðisstiganum í einum samfelag – á sama hátt sum eitt nú bókmentir og list: Sumt verður hildið at vera betri enn annað. Tað verður hildið at vera smart, kul og nýmótans at nýta ensk orð, og tey, sum brúka hesi orð fáa samstundis hesi somu positivu virðir sett á seg, so tí er tað ikki so løgið, um nýtslan av enskum orðum vinnur fram. Hinvegin verða fólk, sum brúka heimlig orð í sínum máli, fatað sum bygdaslig, provinsiel og gammaldags, men álitandi. Hetta er ein søgulig sannroynd og ein av treytunum, sum málrøktin arbeiðir undir. Men vit gevast ikki á hendur.

Tá vit í dag tosa um málið í sms'um, kjatti, netkjaki, facebook o.s.fr. skal eg skunda mær at siga, at málnevndin skal halda fingrarnar langt burtur frá hesum miðlunum. Tí so leingi talan er um privat, persónligt samskifti, liggur tað uttan fyri økið hjá málnevndini. Málnevndin skal savna seg um málið í tí almenna rúminum, og tað er t.d. á almennum netsíðum, hjá Kringvarpinum, bløðunum, almennum stovnum o.s.fr.

### Stóra avbjóðingin

Hóast føroyskt er eitt fáment mál, so eru tær málpolitisku uppgávurnar ikki minni – helst størri - enn í øðrum størri málsamfeløgum. Tá vit t.d. hugsa um kunningartøkni er øll navigatiónskunning á enskum ella donskum: Í telduspølum, fartelefonum, telduforritum o.s.fr. Her er nógv arbeiði eftir at gera. Hvør er tað, sum skal taka um endan í øllum hesum spurningum? Tað er natúrligt, at tað er málnevndin. Men til tess at vera tann varhundur, hon av røttum eigur at vera, má hon styrkjast. Hon má fáa ta neyðugu arbeiðsorkuna, um tær uppgávur, sum málnevndin eigur at røkja, skulu fremjast.

Tann stóra avbjóðingin í framtíðini verður at virka undir tí veruleika, at enskt er eitt mál við stórari prestisju. Í kanningum mínum av hugburði til enskt, spurdi eg míni heimildarfólk, hvat tey hildu, um nú allur heimurin hevði enskt sum móðurmál – 80 % hildu ikki, at tað var í lagi.. So spurdi eg, hvat tey hildu, um so var, at føroyskar fyritøkur fóru at brúka enskt sum arbeiðsmál. Her svaraði fjórði hvør, at tað var í lagi. At umleið 25 % eru samd í, at tað er í lagi við enskum sum arbeiðsmáli á føroyskum fyritøkum sigur mær, at hugburðurin til enskt kann vera rættiliga positivur í teimum "røttu" umstøðunum. Grundgevingarnar fyri at siga, at tað er í lagi við enskum sum arbeiðsmáli á føroyskum fyritøkum, er altjóðagerðin: Tað er praktiskt at kunna nýta eitt altjóða mál, og so mugu vit heldur ikki gloyma, at tað gevur prestisju at kunna orða seg á enskum, bæði í skrift og talu. Hví síggja vit so nógv enskt á føroyskum kjatt- og netkjakssíðum? Tað er tí at við at brúka enskt avdúkar tú tíni virðir, og málnýtslan vísir, hvussu tú vilt verða uppfatað/uppfataður.

### Latið fakfólkini sleppa framat

Eg kann ikki enda uttan at koma inn á tað brimandi orðaskiftið um stavraðið. Í summar tók kjak seg upp um tað føroyska stavraðið. Her vóru tað politikararnir, sum gingu á odda. Mælt varð til at seta stavirnar *c, x, q, z* og *w* inn í stavraðið. Nú var málspurningurin vorðin politiskur, og tingfólk sluppu at breiða seg út um henda spurning. Alt gott um tað. Men hetta mál fær meg at hugsa um orðafellið, at man ikki sær skógin fyri berum trøum. Ein víðkan av stavraðnum merkir ikki nakra stavsetingarliga kollvelting. Stavraðið hevur helst eitt vist signalvirði, sum vit ikki skulu síggja burtur frá, men tað hevur fyrst og fremst ein praktiskan týdning: tað skal skjalprógva hvørjir stavir verða brúktir í føroyskum og vísa raðfylgjuna av teimum. Men úrslitið av teirri politisku viðgerðini var í lagi, tí at niðurstøðan var at geva landsstýriskvinnuni heimild at stovna eitt málráð. Mín bøn til politikararnar skal tí vera: Latið málpolitikkararnar sleppa at avgera spurningin um stavraðið, og brúkið tit heldur orkuna upp á at orða ein yvirskipaðan málpolitikk, har tit greitt siga, hvat tit ætla at gera fyri at styrkja og menna tað føroyska málið, so tað kann standa seg í kappingini móti enskum og donskum og latið pengar fylgja við.

Við hesum havi eg roynt at givið eitt boð upp á, hvussu eg síggi uppgávurnar hjá málnevndini í framtíðini. Í stuttum: Politikarar, haldið fingrarnar burtur frá allari detailstýring av málinum, latið fakfólk gera tað arbeiðið, tí tað duga tey betur enn tit. Brúkið tit orkuna upp á at stinga út í kortið ein framskygdan málpolitikk og gerið tað samstundis møguligt, at ein slíkur framskygdur málpolitikkur kann fremjast í verki og verður til bata fyri málið. Og tað gerst best við at betra umstøðurnar hjá málnevndini ella hvussu hesin stovnur fer at eita í framtíðini. Soleiðis kunnu vit brynja okkum at taka ímóti framtíðini.